TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:



Á dagstovninum millum Bóla eru tvær barnagarðsstovur við 20 børnum í hvørjari 8 starvsfólk arbeiða á stovninum

## Dagstovnin millum Bóla eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum reingerðarfólki at arbeiða 18 tímar um vikuna, aðru hvørja viku, at byrja 23. februar 2006.

**Setanarviðurskifti**
Starvið sum pedagogur verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Starvið sum reingerðarfólk verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Elsu Nielsen, stovnsleiðara, tlf.421375.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum millum Bóla, í Líðini 20, FO-410 Kollafjørður í hendi í seinasta lagi **mánadagin 9. januar 2006.**



Á stovninum eru 4 vøggustovustovur við 12 børnum í hvørjari stovu.

12 starvsfólk arbeiða á stovninum.

## Dagstovnin á Landavegnum eftir:

- einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 40 tímar um vikuna
- einum pedagogi til barnagarð at arbeiða 40 tímar um vikuna
- einum pedagogi til barnagarð at arbeiða 30 tímar um vikuna
- einum hjálparfólki til barnagarð at arbeiða 40 tímar um vikuna

Pedagoglesandi, ið verða liðug í februar 2006, eru vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 1. mars 2006.
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Kirstin Djurhuus, stovnsleiðara, tlf. 302380 / 272949.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum á Landavegnum, Landavegur 84, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi **mánadagin 30. januar 2006.**



Á stovninum er ein vøggustova við 10 børnum og tvær barnagarðsstovur við 17 og 20 børnum. Trý og fýra starvsfólk eru í hvørjari stovu.

## Býlingshúsið undir Brúnni eftir:

- einum pedagogi at arbeiða 35 tímar um vikuna til barnagarð at byrja skjótast gjørligt.
- einum pedagogi, fyri pedagog í barsilsfarloyvi, at arbeiða 35 tímar um vikuna til barnagarð at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu. Farloyvistíðin er frá 1. mars 2006 til 28. februar 2007.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Guðrun Vang, varaleiðara tlf. 319180.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9b, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi **mánadagin 9. januar 2006** til starvið fyri pedagog í barsilsfarloyvi og **mánadagin 30. januar 2006** til starvið sum pedagogur.

- leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Deildarleiðari til barna- og ungdómsdeildina



## Barna- og ungdómsdeildin

Barna og ungdómsdeildin er ein nýsskipað deild undir trivnaðarfyrisit-ingini.

Barna- og ungdómsdeildin umsitir og hevur ábyrgd av 104 milliónum kr. av býráðsins fíggjarætlan 2006.

Í kommununi eru 35 dagstovnar, dagrøkt, tvær frítíðarstovur, 7 frítíðar-skúlar og ungdómshúsið, Margarinfabrikkin.

Tilsamans eru 1545 vøggustovu-barnagarðsbørn á dagstovnum, í dagrøktini eru 130 børn, í frítíðar-skúla 1. og 2. flokki eru 480 børn.

380 ársverk eru knýtt at stovnunum og gevur tað áleið 450 starvsfólk.

Í sambandi við bygnaðarbroytingar er eitt spennandi starv sum deildarleiðari til nýstovnaðu barna- og ungdómsdeildina leyst at søkja. Deildin kemur at taka sær av dagstovnunum, dagrøktini, frítíðar-skúlunum, ungdómshúsum og ráðgevingarstovuni (stuðul til børn við serligum tørvi). Deildarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til trivnaðar-stjóran.

**Sum deildarleiðari hevur tú ábyrgdina av at:**

- leiða og menna økið, ið hoyrir til deildina
- verða við til at leggja framtíðarætlanir fyri økið við støði í barna- og ungdómspolitiska stevnumiðnum hjá býráðnum
- syrgja fyri at politiska og pedagogiska endamálið í dagstovnalógini verður fylgt.
- samskipa virksemi á økinum, m.a. skeiðvirksemi og ráðgeva leiðarum.
- gera fíggjarætlanir og hava fíggjarligt eftirlit soleiðis, at størst nytta fæst úr tilfeingi kommununar
- gera og seta í verk yvirskipaðar mannagondir

**Vit ynskja at tú:**

- hevur útbúgving frá hægri læristovni
- hevur leiðslu- og umsitingarligar royndir.
- hevur hug og hegni til at leiða, gongur á odda, er opin, mennandi, motiverandi og tekur initiativ, dugir at samskipa og er fyrikomandi
- dugir væl at fyrisita og samskifta bæði innan- og uttanhýsis og er til reiðar at taka avgerðir.
- dugir væl at málbera teg á føroyskum bæði í skrift og talu
- hevur góðan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**

- eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv við nógvum avbjóðingum
- gott arbeiðsumhvørvi
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt ájavnt 35. lønarflokki í tænastastumannasátt-málanum umframt 15 % í eftirløn.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, (gunnleyg@torshavn.fo) ella Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, tlf. 30 20 10.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um úbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. januar 2006 kl. 12:00.
Viðmerk á umsóknina "deildarleiðari".

- leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

**Felagið fyri bilhandlarar og verkstaðseigarar**

**Øllum limum verður ynskt gleðilig jól og gott nýggjár**

F•B•V

*Vit ynskja viðskiftafólki okkara gleðilig jól og gott nýggjár við tøkk fyri gott samstarv í farna ári*

Grannskoðarastovan
480 Skáli



Viðskiftafólki okkara verður ynskt eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár við tøkk fyri tað skjótt farna



Sp/f Reel